## DAGSINS MEINING

### Samgongan við at sprongja seg sjálva í luftina

Fíggjarmálaráðharrin hevur kastað handklæðið í løgtingið. Hevur latið ábyrgdina at gera eina líkinda fíggjarlóg frá sær til løgtingið, og tí má hann eisini rokna við, at løgtingið, í fyrsta umfari Fíggjarnevndin finnur 200 mill. kr. í sparingum. Hetta segði formaðurin í Fíggjarnevndini, Óli Breckmann við útvarpið í vikuni. Álvarsligir trupulleikar eru í samgonguni. Tað prógvaði viðgerðin av fíggjarlógini.

Var tað bara Óli Breckmann, sum tók til orðanna, kundi man kanska sagt, at tað er bara Óli , og at tað er ikki óvanligt, at hann er í andstøðu til sínar egnu. Soleiðis hevur tað verið so oftani. Munurin er tann, at nú er hann ikki bara vanligur tingmaður. Hann er formaður í Fólkaflokkinum, og hann er formaður í tí máttmiklu Fíggjarnevndini. Og so er tað ikki bara Óli heldur. Fleiri samgongutingmenn eru ikki fegnir um fíggjarlógaruppskotið, og enn er bara toppurin av ísfjallinum komin undan. Tí tá teir einstøku landsstýrismenninir skulu til at taka støðu til stórar skerjingar verður ballada. Hvør fer at ganga við til, at teirra málsøki verða skerd! Vit hoyra longu hvat ein av teimum sigur. Ikki pláss fyri sparingum í Oljumálaráðnum. Og soleiðis vil tað helst eisini ljóða frá øllum hinum. Tjóðveldisflokkurin vísir á, at mong av teirra málsøkjum hava fingið hægri játtanir, tí tað er í tráð við vallyftini hjá øllum flokkum. Men har hevur formaðurin í Fíggjarnevndini sett spurnartekin við, hví eitt nú Anliss, Páll og Bill fáa so stórar hækkkingar, tá Bjarni Djurholm roynir halda aftur. So her verður lagt upp til balladu.

Nýggir tónar eru at hoyra frá nýggju tingkvinnu Tjóðveldisfloksins, Kristinu Háfoss. Og teir ljóða neyvan eins gott í øllum tjóðveldisoyrum. Flokkurin hevur fingið nýggja talskvinnu í búskaparmálum, og tað er greitt, at nú hon hevur undir tingviðgerðini hevur víst á, at tað eigur ikki at vera trupult at finna 200 mill. kr. í sparingum, so fangar borðið. Tað er kanska nettupp tað Óli Breckmann dyrgir eftir. Tá verða tað fyrst og fremst hennara egnu floksfelagar í landsstýrinum, ið mugu til at spara. Hetta kann skapa stórar spenningar í samgongu og innanhýsis í Tjóðveldisflokkinum. Tá Háfoss so fer í útvarpið og tosar um almennar uppsøgnir má hon sigast at vera næsadjørv. Tí hetta kann skapa rumbul í veljaraskara floksins, har mong arbeiða hjá tí almenna.

Onkur vil heldur tulka hesa útsøgn hennara sum eitt úttrykk fyri desperatión, so cool henda nýggja drotning Tjóðveldisfloksins enn kann virka. Hon hevur í veruleikanum fingið ein uriaspost: at skula byggja brýr millum Tinganes og Løgtingið. Hetta kann vera sum at skula loysa ein gordiskan knút. At finna sparingar uppá 200 mill. kr. hjá eitt nú sínum egnu landsstýrisfólkum verður ikki nøkur løtt uppgáva fyri ta annars so avkláraðu Háfoss. Hetta veit Breckmann, sum í løtuni er við at savna sær lóður at leggja í føvningin hjá Háfoss til at brúka móti Annlis og Páll. Lóður, sum í síðsta enda kann spreingja samgonguna í stumpar og stykkir.

**Sosialurin**

# Minningarhald fyri deyð børn

TÍÐINDASKRIV
*Felagið Pinkubarnadeyði*

Fyrsti sunnudagur í november er, sum øllum kunnugt, Alla Halganna sunnudagur. Flestu kirkjurnar í Føroyum minnast hendan dagin tey fólk, sum doyðu á sjónum í farna árinum.

Felagið Pinkubarnadeyði tók stig til slíka gudstænastu á fyrsta sinni í nov. 97. Undirtøkan var so góð, at vit valdu at gera hetta sum ein vakran og afturvendandi sið, har øll kunnu minnast deyða barn sítt – óansæð og í hvørjum sambandi barnið var deytt.

Felagið Pinkubarnadeyði kann á 6. ári bjóða foreldrum og avvarðandi til minningarhald sunnudagin 3. nov. annaðhvørt í Dómkirkjuni í Havn ella í Christianskirkjuni í Klaksvík.

Tá ið vit missa eitt barn, missa vit ein part av okkum sjálvum. Ein part av okkara framtíð, ein part av okkara samleika. Vit náddu at knýta sterk bond til børn okkara, annaðhvørt tey vóru fødd ov tíðliga, til tíðina ella vit hava livað saman við teimum.

Saman við børnunum í familjuni – tey sum vóru og tey, sum eru komin – minnast vit tey deyðu børnini við einum dámi av góðsemi og fløvan. Einum siði við ritualum, ið er við til at binda bond ímillum fortíð og framtíð.

Minningarhald verða Alla Halganna sunnudag 3. nov. kl. 16.00 á hesum støðum. Dómkirkjan: (Havnar kirkja) har Inga Poulsen Dam, sóknarprestur prædikar og Signar í Homrum luttekur við sangi og í Christianskirkjuni í Klaksvík, har Hans Eiler Hammer, sóknarprestur prædikar og kór undir leiðslu við Steinvør Fonn luttekur við sangi.

Minningarhaldið verður sum ein vanlig gudstænasta við altargongd. Tað verður møguleiki hjá teimum, sum hava hug til tess at tendra eitt ljós, fyri tí barni, ið farið er og fyri at vísa kærleika, ið ongantíð verður gloymdur.

Í dag liva vit í eini mentan, har vit dagliga skulu vísa skjótleika og framfýsni, sum prógv uppá, at vit liva lívið til fulnar. Henda sterka kenslan av felagslagnu, gevur bæði foreldrum og avvarðandi frið og møguleika at minnast og dvølja við kærleikan, ið var. Henda dagin minkar kenslan av missinum ikki, men tað er hinvegin ongin, sum heldur, at minnini oyðileggja lív foreldranna. Við at tora, at minnast tey deyðu, ásanna vit bert, at hóast stóra sorg, megna vit at halda fast við trúnna, vónina og kærleikan.

Felagið Pinkubarnadeyði hevur opið hús annan leygardag í hvørjum mánaða. Her hevur tú møguleika at hitta onnur foreldur, ið hava mist eitt barn. Leygardagin 9. nov. kemur Heri Joensen, prestur, at tosa um evnið: Lívsvirðir eftir tú hevur mist eitt barn. Øll, ið hava áhuga í evninum eru hjartaliga vælkomin.

[Klipp] mánadag hin 4. november

# Yi Yi - Familjudreymar

TÍÐINDASKRIV



Mánakvøldið hin 4. november klokkan 19:30 verður annar filmurin í røðini hjá Klipp, Filmsfelagi Norðurlandahúsins, sýndur. Filmurin er av oynni Taivan. Og við hesum framúrskarandi og virðislønta filmi slær oyggin í fjareysturi rimmarfast, at søgan um stórbýarhúskið ikki bert finst í vesturlendskari mentan.

Hjúnini NJ og Min-Min búgva, saman við børnum teirra og gomlu mammu Min-Min's, í einari íbúð í miðbýnum í Taipei. NJ eigur í eini teldufyritøku og leggur alla arbeiðsorku í at venda vánaligu gongdini. Kona hansara Min-Min, sum leiðist við alt, ger knappliga bart og søkir sær hjálp hjá einum religiøsum guru. Tannáringurin Ting-Ting verður forelskað fyri fyrstu ferð, og 8 ára gamli Yang-Yang, sum hevur sínar egnu lívsáskoðanir, fær trupulleikar í skúlanum av hesum. Samstundis liggur mamma Min-Min í koma, og øll í húsinum skulu við jøvnum millumbilum greiða henni frá, hvat tey hugsa og uppliva.

Við rárum fínligum blandi av poesi og veruleika eygleiða vit ein dagligdag, vit øll kenna aftur, sjálvt um stórur munur er á mentanunum. Stórslignu myndirnar og sniðfundiga skemtið lýsir greitt lívsjáttandi boðskapin í filminum: at lýsa vakurleikan soleiðis, sum hann ger vart við seg mitt í gerandisdegnum, sum vit halda okkum kenna so væl.

Filmurin "Yi - Yi" hevur fingið hópin av virðislønum kring allan knøttin., m.a. fekk leikstjórin Edward Yang, fult uppibornu virðislønina sum besti leikstjóri í Cannes 2000.

Klipp, Filmsfelag Norðurlandahúsins sýnir filmin "Yi Yi - Familjudreymar" í Høllini í Norðurlandahúsinum mánakvøldið hin 4. november klokkan 19:30.

Edward Yang, Taiwan, 2000, "Yi Yi" 173 min.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Fundamentalisma - nýtsla og misnýtsla

**Rúni Rasmussen**



Orðið fundamentalisma hevur verið nógv frammi í orðaskiftinum seinastu tíðina. Orðið er nógv nýtt, men tíverri er tað oftast misnýtt. Fundamentalisma er eitt orð, sum hevur fleiri týdningar, og ofta er tað trupult at staðfesta, hvussu orðið skal nýtast og í hvørjum sambandi. Tískil meti eg, tað skilagott at hyggja eitt sindur nærri at, hvør upprunin av orðinum er, hvussu tað hevur verið nýtt, og eisini er tað avgerandi at peika á ymisk sløg av fundamentalismu.

Fundametalisma verður ofta brúkt í einum negativum tóna til tess at lýsa ein bólk av fólkum, sum eru fanatisk, irrationell, intolerant og trongskygd. Serliga hevur tað í seinastuni verið nýtt til at lýsa fólk, sum kallað seg kristin og hava bíbliuna sum grundarlag í sínum lívi. Hesi kristnu fólkinini verða kallað fundamentalistar á ein negativan og niðursetandi hátt. Tey, sum nýta orðið á henda hátt, halda seg hava rætt til at seta ein ávísan bólk av fólki í ein bás, har eyðkennini hjá hesum menniskjum er fanatisma, irrationalitetur, intoleransa og trongskygni. Tey fólk, sum nýta orðið fundamentalisma á henda hátt, halda seg kanska vera upplýst, men í roynd og veru prógva tey sína vantandi vitan um týdningin av orðinum og nýtslu tess.

**Søguligur uppruni**
Fundamentalisma varð upprunaliga nýtt um ein protestantiskan trúarbólk í Amerika, sum legði stóran dent á, at bíblian er Guds orð, at Jesus reis upp frá hinum deyðu, moydómsføðing Krists, sáttargerðina og Jesu seinnu komu. Tey, sum tóku undir við hesum lærusetningum kallaðu seg fundamentalistar. Hesir lærusetningar vórðu m.a. viðgjørdir og vardir í bókarøðini *The Fundamentals,* sum kom út í tólv bindum millum 1910 og 1915. Fundamentalistar vóru tey, sum stuðlaðu sjónarmiðunum og bíbliufatanini, sum vórðu viðgjørd í hesum bindum.

Curtis L. Laws (1868-1946), sum var blaðstjóri á baptistiska tíðarritinum *Watchman-Examiner,* nýtti í 1920 orðið fundamentalistur um separationistar, sum vrakaðu liberalismu og trúðu á klassisku evangelisku læruna. Seinni varð fundamentalisma brúkt á ein negativan hátt til tess at lýsa fólk, sum høvdu ein antisosialan og antiintellektuellan hugburð mótvegis mentan. Fundamentalist-arnir vóru upprunaliga militantir og vóru harðliga ímóti modernaðari mentan. Fyri at kunna skilja atferð teirra, er neyðugt at hava í huga, at menningarlæran og bíbliukritikkurin (liberalgudfrøði), sum førdi fram, at bíblian var ikki Guds orð, høvdu stóru framgongd í hesum tíðarskeiði. Fundamentalisman var tískil eitt alternativ til sekulariseringina og relativistisku hugsanina.

Framferðarhátturin hjá amerikonsku fundamentalistunum bleiv meiri hóvligur sum tíðin gekk, men teirra bíbliufatan og lærusetningar eru ikki broyttir. Upprunaligi týdningurin av orðinum fundamentalisma er ein ávís bíbliu - og lærufatan.

**Ymisk sløg av fundamentalismu**
Nú á døgum verður fundamentalisma ikki einans nýtt um teir umtalaðu amerikansku fundamentalistarnar, men eisini um aðrar átrúnaðir. Orðið er nógv broytt, tí tað hevur verið brúkt til at lýsa nógvar ymiskar fatanir. T.d. verður tosað um jødiska og islamiska fundamentalismu.

Jødisk fundamentalimsa verður ofta nýtt í fjølmiðlunum, tá ið tosað verður um víðgongdar jødiskar bólkar, sum nýta vald og yvirgand sum náttúrligar miðlar fyri at náa síni mál. Dømi um hetta er morðið á ísraelska forsætisráðharran Yitzhak Rabin í 1995. Hann bleiv myrdur av einum víðgongdum jøda (fundamentalisti).

Fundamentalisma verður í stóran mun sett í samband við víðgongdar muslimar. Hetta hevur sína náttúrligu forklárinar.

Í 1979 komu víðgongdir muslimar til valdið í Iran. Valdið var tikið fra shahinum, og Iran var proklamerað sum eitt islamiskt lýðveldi. Nýggja stjórnin við Ayatolla Khomeini gjørdist eitt ómenniskjaligt og harðrent stýri, sum var grundað á lógirnar í koranini. Eydnan hjá teimum víðgongdu muslimunum í Iran gav íblástur til islamistiskar fundamentalistar í fleiri grannalondum til at náa somu mál. Islamisk fundamentalisma bleiv ein týðandi bólkur í nógvum londum, og høvdu fundamentalistarnir stóra ávirkan á samfelagsskipanina í fleiri londum.

Ein avleiðing av framkomuni av militantum muslimum var, at orðið fundamentalisma fekk ein breiðari týdning og tað bleiv nógv oftari nýtt í fjølmiðlunum. Aftaná 11. september 2001 hevur orðið verið sera nógv nýtt. Osama bin Laden man vera besta dømi um ein muslimskan fundamentalist.

Fundamentalisma hevur breiðan týdning. Muslimiskir fundamentalistar eru t.d. í Irak, jødiskir fundamentalistar í Ísrael og traditionellir fundamentalistar í USA, sum løgdu dent á bíbliuna sum teirra grundarlag í lívi og læru.

**Definitiónir**
Orðið fundamentalisma kemur úr latíni. *Fundamentum* er latínska heitið, og merkir tað grundvøllur. Sostatt er talan um ein grundvøll ella eitt fundament. At talan er um eitt fundament, sigur okkum ikki so nógv, tí tað kunnu vera nógv sløg av fundamentum.

Hvussu kunnu vit vita, hvat oriðið hevur at týða? Hetta er ein góður spurningur. Vit kunnu hyggja at nøkrum definitiónum. Í Politikens Nudansk Ordbog stendur um fundamentalismu: *teologisk retning, der hævder Bibelens absolutte ufejlbarlighed.* Í Donskføroysk orðabókini hjá Stiðanum frá 1998 stendur um fundamentalismu: *gudfrøðilig áskoðan at halgabók er fullkomiliga lýtaleys.* Í Webster´s Dictionary (1957) verður orðið definerað soleiðis*: A recent movement in American Protestantism re-emphasing as fundamental to Christianity belief in the inerrancy og the Scripture, Biblical miracles, especially the virgin birth and physical resurrection of Christ, etc.* Í eini týskari orðabók frá 1977 verður orðið definerað soleiðis: *am. Glaubenslehre (Bibel als alleinige Glaubensgrundlage).* Ensk-íslendsk orðabók frá 1984 sigur um orðið: *biblíufesta, bókstaftrú að orð bibliunnar séu innblásin af guði og að þeim beri að trúa og fylgja í einu og öllum.* Orðið bíbliufesta er áhugavert, tí tað verður eisini nýtt í Ensk-føroysk orðabókini hjá Stiðanum frá 1993. Orðið festa merkir: staðfesta, støðugleiki, hald. Seinasta definitiónin av kristnari fundamentalismu er tann hjá Oxford Advanced Learner´s Dictionary: *the belief that everything that is written in the Bible is completely true.*

Hvat er endamálið við at vísa á so nógvar definitiónir? Endamálið er at geva lesaranum eina fatan av, hvat orðið merkir og hvat tað ikki merkir. Niðurstøðan av øllum definitiónum er, at fundamentalisma snýr seg um bíbliufatan, at bíblian er lýtaleys og einasta grundarlag fyri lívi og læru.

**Føroyskir fundamentalistar?**
Havi hug at spyrja: Hvørjir eru teir føroysku fundamentalistarnir, sum so ofta verður sipað til? Veit ikki rættiliga; kanska best man vera at spyrja tey, sum eru so ófør seta ávís fólk bás. Tað eru nógv, sum eru ørkymlað av nýtsluni av orðinum, tá ið tosað verðir um føroyskar/kristnar fundamentalistar. Hesir "religiøsu" fundamentalistarnar verða ofta settir í sama bás sum víðgongdir muslimar, sum hava vald og yvirgang sum nátturligar miðlar til at náa síni mál. Hava kristnir fundamentalistar nakað í felag við Osama bin Laden, Al Quada og Hamas, sum nýta yvirgang sum sítt høvuðsvápn? Talan er um eina púra høpisleysa samanbering.

Um tosað verður um føroyskar fundamentalistar, eiga vit at hava í huga, at talan er um eina bíbliufatan, sum sigur, at bíblian er eitt lýtaleyst og haldgott fundament, og hvat grundarlag ein hevur fyri lívi og læru. Talan er ikki um fólk, sum eru fanatisk, irrationell, intolerant og trongskygd. Kanska eru tað tey, sum eru so ófør at seta ávís fólk í bás, sum hava brúk fyri at víðka sín sjónarring, tí hann tykist at vera nakað smalur.

Tað eru mangir føroyingar, sum hava Guds orð sum sítt fundament. Kanska eru teir fleiri enn vit halda! Ein, sum hevur Guds orð sum lívsins grundvøll, eigur ikki at skammast við sítt fundament. Um onnur kalla ein fundamentalist, eigur ein ikki at vera keddur um tað, tí ein kennir betur sítt egna fundament, enn tey sum royna at lýsa fundamentið hjá einum sum havandi hesi eyðkenni: intoleransa, trongskygni, fanatisma o.s.fr. Tey, sum eru so ófør at kalla ávís fólk fundamentalistar í einum negativum og niðursetandi tóna, hava kanska ein trupulleika, tí tey sakna eitt fundament, sum verður standandi, tá ið lívsins stormar herja, og avdúkað verður, um vit hava bygt á sand ella hellu (fundament)!

Tað man ikki vera nøkur kirkja ella samkoma, sum endurtekur sítt fundament so ofta sum fólkakirkjan. Trúarjáttanin, sum er grundarlagið fyri virksemi og læru fólkakirkjunnar, verður endurtikin hvønn sunnudag í kirkjunum kring landið: *"Eg trúgvi á Gud Faðir, hin alvalda, skapara himins og jarðar. Eg trúgvi á Jesus Krist, Guds einborna Son, váran Harra, sum er gitin av Heilaga Andanum, borin í heim av Mariu moy…"* Fólkakirkjan hevur bíbliuna sum sítt fundment; bíblian er Guds orð og grundarlag fyri lívi og læru kirkjunnar. Havandi hetta í huga, kunnu vit avgjørt siga, at fólkakirkjan er ein fundamentalistisk kirkja. Brøðrasamkoman, hvítusunnurørslan, karismatiska rørslan o.s.fr. eru eisini allar fundamentalistiskar rørslur. Tær eru fundamentalistiskar í upprunatýdningi: tær trúgva, at bíblian er lýtaleys, eitt haldgott fundament, at Jesus reis upp hinum deyðu, at Gud hevur gjørt okkum sátt við seg, at Jesus kemur aftur o.s.fr.

Neyðugt er at undurskoða okkara fatan av orðinum fundamentalismu, um vit ynskja at hava eitt upplýst og sakligt orðaskifti um viðurskifti, har orðið verður nýtt. Tað er gott og rætt at nýta orðið fundamentalisma, men at misnýta orðið er alt annað enn mennandi fyri komandi orðaskifti.

Klipp:

# Eksotiskir filmar

TÍÐINDASKRIV

Fátt kann sum filmur geva innlit í fjarløgd samfeløg. Klipp, Filmsfelag Norðurlandahúsins, fer nú at sýna tveir sjáldsamar filmar, ið lýsa so fjar samfeløg sum Taipei á oynni Taivan og bygdalagið Champaner í Gujarat í India.

Tó, tá vit síggja hesar filmar koma vit skjótt eftir, at søgurnar eru heimligar, hóast smálutir eru fremmandir. Góðar søgur kenna ikki landamørk.

Í teivanska filminum "Yi Yi - familjudreymar" verður gerandislívið lýst á einum skaldabornum máli í einum nútimans parti av Asia, sum vit lættliga kenna okkum aftur í. Hesin filmur verður sýndur 4. november.

Í indiska filminum "Lagaan" verða søguligar hendingar, hjálandaveldi og frælsisandi, kærleiki og sangleikur, latin úti ein stóran, kókandi jólapott, sum Klipp, Filmsfelag Norðurlandahúsins, borðreiðir við í advent. Hesin filmur verður sýndur 2. desember.

Báðar sýningarnar verða í Høllini í Norðurlandahúsinum klokkan 19.30.